# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.




HJÁLP TIL AT FESTA HUGSAN Á BLAÐ

Føðingardagar · Starvsdagar · Minningarorð

**Fært tú ikki tikið teg saman?**

Hugsar tú um at seta eina heilsan í blaðið í sambandi við onkran merkisdag í familjuni ella hjá arbeiðsfeløgum. Her verður eitt nú hugsað um rundar dagar, føðingardagar, gullbrúdleyp, starvssetanir, jubileum á arbeiðsplássinum o.s.v.

Set teg í samband við okkum. Um vit fáa nøkur stikkorð, so kunna vit í felag skriva greinina, sum verður meira áhugaverd at lesa, tá ið tit senda okkum eina mynd við. Tað sama kann gerast í samband við minningarorð.

Sosialurin

"Nøvn í vikuni"
Tel.341800 / 216135
Teldupost: maggi@sosialurin.fo





Móttøka

Í sambandi við at vit flyta úr Tannlæknastovuni í Brekkugøtu 8 í nýggju Tannlæknastovuna í Dalatúni 19 hava vit móttøku fyri okkara viðskiftafólkum, starvsfelagum, vinum og kenningum og annars øllum sum hava havt við nýbygningin at gera fríggjadagin 28. oktober, frá klokkan 15 til 17.

Marnar Gaard · Ísak Thomassen · Regin Eikhólm


Tórshavnar alfrøði:

## Havnar Grammofon Klubbi



Hendan myndin er av limum í Havnar Grammofon Klubba í 1943. Felagið varð stovnað undir krígnum við tí endamáli at lána plátur til limirnar í felagnum og at koma saman at lurta eftir plátum. Undir krígnum var ringt var at fáa fatur í grammofonplátum, og tær vóru ógvuliga dýrar.

Á myndini eru, standandi, frá f.v.: ókend, William Heinesen, ókendur, Stig Rasmussen, Ebba Johansen, Verland Johansen, »Iska« Jacobsen, Anna Kathrina Jacobsen, Ingibjørg Restorff og Trygvi Restorff.

Sitandi f.v.: Leif Mohr, ein dani, Einar Joensen og Erling Isholm

Um onkrir av lesarunum kennir teir ónavngivnu persónarnar á myndini og veit meira um felagið, hvar í býnum tað helt til, og hvussu leingi felagið helt á, vera tey vinarliga biðin um at ringja til Birgar Johannessen á tel. 314647 ella 214647.